# ítróttur

Nr. 88 • fríggjadagur • 9. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



*Starvsnevndin hjá HSF fer øll frá á aðalfundinum sunnudagin. Talan er ikki um illstøður av nøkrum slag, men felagsnevnarin tykist vera, at orkan ikki er til framhald í nevndarsessunum*

# Nevndin orkar ikki meira

**Á komandi aðalfundinum hjá Hondbóltssambandinum er væntandi, at øll nevndin leggur frá. Orsøkirnar eru ymiskar, men fyrst og fremst tykist talan heilt einfalt at vera um slit**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sunnudagin komandi hevur Hondbóltssambandið aðalfund. Ein aðalfund, sum vanliga er av teimum meira friðarligu, men sum í ár hevur fingið ein heilt nýggja dimensión.

Tað er nevnliga so, at mest sum allir nevndarlimirnir hvør í sínum lagi hava gjørt av at kasta handklæði í ringin – fyribils í øllum førum – og hetta ger, at ein heilt nýggj leiðsla helst skal finnast sunnudagin.

### Uppslitin

Petur Ove Petersen er í løtuni formaður í HSF, og hann váttar, at støðan í løtuni er tann, at mest sum eingin av starvsnevndarlimunum heldur fram. Hesi hava annars verið fýra í tali, Thurid Samró, Kári Durhuus og Svein Rógvi Nielsen, umframt formannin sjálvan.

Thurid verður ikki í Føroyum komandi tíðina, og tí er tað vónleyst hjá henni at taka nakran nevndarsess, og frá hinum trimum tykjast felags boðini at vera, at teir í løtuni ikki hava ta orkuna, sum krevst til ein slíkan nevndarsess.

- Sjálvur hevur Petur Ove sitið sum formaður í HSF síðani 1996, við einum vanligum borgarligum starvi við síðuna av, er tað mest sum givið, at tað skal verða tungt. Somuleiðis hava Kári og Svein Rógvi havt sítt at síggja til í gerandisdegnum, umframt at báðir eisini hava verið aktivir sum venjarar.

Tí er frágreingin mest sum einvíst, at nevndarlimirnir eru uppslitnir.

### Stór fet tikin

Eitt er, at nevndarsessirnir nú skulu mannast av nýggjum, men tað skerst ikki burtur, at spurningurin um bygnaðin hjá HSF kanska skuldi verið endurskoaður samstundis.

Við verandi bygnaði er tað nevnliga soleiðis, at ein lutfalsliga heilt stórur partur av fyrisitingarliga arbeiðinum hvílir á herunum á teimum, sum eru í starvsnevndini.

Og tað skerst ikki burtur, at hesi seinnu árini hava framt eitt megnar arbeiði fyri føroyskan hondbólt. Seinasta tíggju ára skeiðið hevur eitt miðvíst arbeiði verið gjørt, til tess at menna føroyskan hondbólt. Einamest á tann hátt, at skipað landsliðsarbeiði aftur er farið fram.

Tá hesin aktivitetur var størstur – í 2000 – vóru ikki færri enn seks landslið hildin koyrandi í senn, og tað er einki at siga til, at hetta krevur orku. Fíggjarliga skal í øllum førum nógv til, fyri at kunna svara hvørjum sítt, og ikki minst krevur hetta nógv av umsitingini, sum skal stýra hesum.

Formaðurin viðgongur eisini, at so er, men samstundis hevur hann hug at sóknast eftir fólki, sum kann átaka sær ein part av ábyrgdini.

- Tað er helst einki at ivast í, at tað rættasta hevði verið, um arbeiðsbyrðan varð býtt út á fleiri nevndir. Men um fólk ikki er at manna nevndirnar, so er tað í sjálvum sær eingin hjálp, tí so fellur arbeiðið alla tíðina aftur á somu persónar.

Akkurát, hvørjir persónar kunnu væntast at koma inn í nýggju nevndina, vil Petur Ove einki siga um.

- Freistin at seta valevni fram, er á sjálvum aðalfundinum, so enn kann nógv henda. Hinvegin hava vit sjálvandi havt onkrar følarar úti ymsa staðni, men akkurát hvussu ítøkiligt hetta er, dugi eg als ikki at siga, sigur Petur Ove at enda.

Men hvussu er og ikki, so skal nevndin mannast. Og tó at talan er um tungt arbeiði, so er heldur einki at ivast í, at byrðan nú neyvan verður størri, enn hon var hjá nú skjótt fyrrverandi nevndarlimunum. Í øllum førum eru stór tøk tikin framá fyri føroyskan hondbólt hesi seinnu árini, og fyri hondbóltin vildi tað verið eitt stórt afturstig, um hetta arbeiði nú dettur niðurfyri.

## Hálvfinalurnar

**Nú er greitt, hvussu spælast skal í hálvfinalunum í kappingini um Løgmanssteypið**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Eftir útsetta dystin millum EB/Streym og B36 mikukvøldið, er nú greitt, hvussu hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið skulu leikast.

Her verður farið fram soleiðis, at tveir dystir verða leiktir. Hin fyrri nú sunnudagin kl. 15.00 meðan seinnu hálvfinalurnar eru á skránni annan sunnudag. Altso 18. mei.

Fyrri dystirnir verða annars soleiðis, at B36 og KÍ spæla í Gundadali undir leiðslu av Oddmar Andreasen. Í Runavík verða tað so NSÍ og GÍ, sum skulu dystast, og verður tað Niklas á Líðarenda, sum skal døma tann dystin.



# Thank You For The Music

**Scillyróðurin er av, og føroysku kvinnurnar eru heimafturkomnar**

GIG-RÓÐUR
*Sjúrður Gullbein, RSF*

Scillyróðurin er av, og føroysku kvinnurnar eru heimafturkomnar. Væl vignaðist, og við sær heim fingu tær ikki minni enn tvey steyp fyri avrik sítt.




*Føroyska manningin á Scilly hesaferð. Nú takka hesar fyri seg*

### Vunnu B-finaluna og sýndu besta ítróttarandа

Hóast tær akkurát ikki sluppu í A-finaluna, sum tær høvdu ætlað, so var hýrurin kortini av tí besta, tá ið liðugt var, tí B-finaluna vunnu tær so spælandi. Í startinum lógu tær eina løtu nummar trý, men spakuliga lirkaðu tær seg fram á oddafiskarnar, og seinna helmingin av róðrinum vístu tær veruliga, hvussu bátur skal rógvast, tá ið tað skal vera sum allarbest — og tær skóru so elegant út í papp, hvør ið sterkastur var. Gloymdar vóru allar sorgir, og dagurin var bjargaður. Dómararnir í kappingini munnu eisini hava varnast vilja og felagsskap teirra, tí umframt sjálvt sigurssteypið, ognaðu tær sær eisini steypið, ið verður latið teirri manning, ið sýnir besta ítróttaranda av øllum. Og hetta er einki minni enn eitt bragd, tá ið hugsað verður um, at yvir hálvtannaðhundrað manningar við túsund rógvarum vóru um boðið. So føroyingar kunnu ikki annað enn vera ernir av kvinnum sínum.

Eftir steypini beyð so Amerada Hess í Føroyum til veitsludøgurða á hotellinum, har sum manningin búði, og seinni á kvøldi stevndu tey ”ungu” á beachparty, har hildið varð á til út á náttina. Tíðliga um morgunin varð so loyst frá landi, og kósin varð aftur sett móti Føroyum.

### Jarnkvinnurnar takka nú fyri seg

Samstundis, sum scillyferðin er av, er eisini onnur søga at enda komin. Av teimum sjey kvinnunum, sum vóru við á ferðini, er tað nevniliga bara Anna Mohr, sum heldur fram at rógva. Hon tekur eitt tørn afturat við Páll Fanga. Kertin Rasmussen og Petra Hansen, ið róðu við Gongurólvi í fjør, verða ikki við í ár, tí manningin er avfarin, og Rannvá Madsdóttir á Riddaranum setst heldur ikki á bekk aftur, tí miðvágsmanningin er somuleiðis givin. Jarnbardur við kvinnum, sum saman við Argjabátinum hevur vunnið fleiri FM-heiti enn nakar annar bátur seinastu tólv árini, og sum harafturat hevur verið besta seksmannafar við kvinnum nakrantíð, verður neyvan mannaður í ár, tí nú takkar gamla gardan fyri seg og leggur árarnar inn. Eivy Olsen er ein av fleiri, ið leita til lesturin, og Jannie Dam Jacobsen og Kristianna Dahl Øster, sum eru tær einastu, ið eftir eru, hava somu hugsan sum damurnar á Kondittarínum - tær hava ikki hug at byrja um aftur við nýggjari manning. Men hvør veit, um ikki onkur av hesum rógvarum, ið hava lagt so nógv eftir seg, fer at taka nøkur tøk fyri kappróðurin upp á annan máta. Tað er at vóna, at so verður.

Men scillyróðurin er av, og nú er tómligt í Scillyoyggjum. Túsund kapp-róðrargestir eru heimfarnir eftir blíðskap og góðar dagar í oyggjunum, sum nú liggja so einsamallar og bíða suðuri í havi. Bíða til næsta ár, tá gestir aftur stevna í oyggjarnar. Og eftir standa eisini scillysjeikarnir. Hvussu langtandi og spentir, teir enn hugdu eftir føroysku kvinnunum, so bar einki til, og nú eru fljóðini flogin.

... and I say - thank you for the music, for giving it to me.



*Petra og Kristianna við sjónliga tekininum um B-sigurin. Steypið gjørdi í øllum førum ikki ferðina minni væleydnaða*



*Tað gjørdist ikki til rógving í A-bólkinum, men millum tær næstbestu var eingin ivi. Har vóru tær føroysku so nógv best*

